| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 25. september 2008 |
| Býráðsfundur nr. | 08/2008 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2008 tann kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 19. sepember 2008 um innkalling til fundar.

**<u>Møtt vórðu:</u>**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard (møtti kl. 16.50).
Dánjal Vang
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Petur Abrahamsen
Súsanna Gaard

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Jón Nolsøe Olsen boðar við telduposti, dagfestum 23. september 2008 borgarstjóranum frá, at hann av persónligum grundum ikki møtir á býráðsfundinum. Borgarstjórin hevur eftir áheitan hansara innkallað varalimin á lista B Súsonnu Gaard til fundin. Signar á Brúnni hevur seinnapartin tann 25. september 2008 boðað borgarstjóranum frá, at hann ikki møtir á fundinum, grundað á skúlafund í Klaksvík, sum hildin verður samstundis, sum býráðsfundurin verður hildin.

Tórfríður Abrahamsen møtti til fundar, men áðrenn borgarstjórin setti fundin alment fór býráðslimurin av fundi uttan fráboðan um hví. Borgarstjórin setti seg í samband við hann, men varð upplýst, at hann ikki kom aftur á býráðsfund, hetta við ongum grundgevingum.
Í sambandi við, at Jann Toftegaard var seinkaður á fundin samtykti býráðið at byrja viðgerðina av máli nr. 50 fyrst. Síðan varð mál nr. 51 viðgjørt, eftir hetta mál nr. 49 og til seinast eykamálið nr. 52.

Við á fundinum luttók eisini Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari.

**<u>Mál nr. 49/2008.</u>**

**Mál viðv. 1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2009.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 17. og 19. september 2008 til fyribils fíggjarætlan fyri kommununa fyri ár 2009.

Vísandi til grein 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 1. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Hjálagda uppskot, sum fíggjarnevndin hevur viðgjørt á fundi tann 17. og 19. september 2008 og gjørt broytingar til í mun til sjálvt uppskotið frá fyrisitingini, javnvigar við kr. 76.668.447,00, og verður roknað við einum avlopi upp á kr. 3.821,00.

Rakstrarútreiðslurnar netto til kr. 30.556.811,00, rentuútreiðslurnar netto til kr. 3.047.954,00, avdráttirnir av føstum lánum til kr. 7.352.000,00 og íløgurnar brutto til kr. 19.660.000,00 og netto til kr. 17.260.000,00.

Avseting til bygging av Røktarheimi, sum sambært býráðssamtykt eigur at verða kr. 2.900.000,00 er lækkað niður í kr. 0,00 í 2009, sum er sama upphædd sum í 2008, 2007 og 2006. Eftir hesi avsetingingum eigur kommunan umleið kr. 7,3 mió. á bók pr. 31. desember 2008 til nevndu bygging. Av tí at spurningurin um 50% studning frá tí almenna, hetta sambært lóg um bygging av ellis- og røktarheimum, so eigur hetta mál at verða tikið upp aftur við landsstýrismannin í Almanna- og heilsumálum skjótast.

Annars hevur kommunan fingið skriv frá landsstýrismanninum, har sagt verður frá, at kommunan onga stuðulsjáttan fær í hesum umfari, so ein Røktarheimsbygging møguliga verður seinkað 4-5 ár í mun til ta ætlan, sum býráðið samtykti 26. november 2002.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 44.220.586,00 við skattaprosenti 21,5%, meðan partafelagsskatturin verður mettur til kr. 5.000.000,00. Nýtslan av innistandandi verður kr. 1,0 mió og mett lántøka kr. 8,0 mió.

Avseting til bygging av Røktarheimi av innistandandi verður kr. 0,00. Higartil hevur eitt kommunuskattaprosent verið nýtt til avsetingina til røktarheimsbygging + nýtsla av innistandandi, men verður neyðugt, um avsetingin skal verða tann sama sum í 2005, sum samtykt er gjørd um, so verður neyðugt við lántøku ella við eykanýtslu av innistandandi.

Um so verður, at avseting aftur verður gjørd í 2009 til Røktarheimsbyggingina, so verður neyðugt sambært býráðssamtykt, sum er galdandi at hækka kommunuskattaprosentið við 1,0%, um raksturin og íløgurnar skulu haldast á tí støði, sum skotið verður upp í uppskotinum til 1. viðgerð.

Fíggjarnevndin samtykti á fundi tann 19. september 2008 at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2009 fyri býráðið til 1. viðgerð. Henda ætlan verður at skilja sum fíggjarligur karmur fyri rakstri, íroknað kommunalum íløgum fyri 2009, og verður málið eftir viðgerð á býráðsfundinum 25. september 2008 víðari viðgjørt av nevndini, sum síðan kemur við útgreinaðum uppskoti til 2. viðgerð á almenna býráðsfundinum, sum sambært lýsingini verður hildin hósdagin tann 30. oktober 2008.

**Avgerð:**
Samtykt varð ar beina málið aftur í fíggjarnevndina til víðari viðgerðar fyri síðan at leggja uppskot til fíggjarætlan aftur fyri býráðið til 2. viðgerð tann 30. oktober 2008. (7-0).

**Mál nr. 50/2008.**

***Viðvíkjandi starvinum sum leiðari av Fuglafjarðar kvøldskúla.***

Ì sambandi við at leiðslubroytingar eru fyribils farnar fram í Fuglafjarðar skúla, har skúlastjórarnir síðan fyrst í áttatiárunum hava verið leiðarar av Fuglafjarðar kvøldskúla, so hevur kommunala fyrisitingin tann 19. august 2008 tosað við virkandi skúlastjóra um nevndu viðurskifti.

Hesin upplýsti, at grundað á at hann bert varð fyribilssettur skúlastjóri, so er hann av teirri meting, at rættast varð at fáa annan persón at taka sær av leiðsluni av frítíðarundirvísingini. Avtalað varð, at hann skuldi tosa við varaskúlastjóran Tórhall Justinussen ella aðrar lærarar um møguliga at taka sær av kvøldskúlanum veturin 2008-2009.

Skúlaleiðslan hevur vent sær aftur til kommununa við fráboðan um, at varaskúlastjórin fyribils hevur játtað at tikið sær av leiðsluni av Fuglafjarðar kvøldskúla.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 11. september 2008 og mælir býráðnum til, at varaskúlastjórin Tórhallur Justinussen fyribils verður settur sum leiðari av Fuglafjarðar kvøldskúla veturin 2008-2009, t.v.s. frá 01. september 2008 til 30. juni 2009.

**Avgerð:**
Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. (6-0). Meðan málið varð viðgjørt varð Jann Toftegaard ikki á fundi.

**Mál nr. 51/2008.**

***Mál viðvíkjandi frítíðarundirvísingini veturin 2008-2009.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Fuglafjarðar kvøldskúla, dagfest 01. august 2008 saman við uppskoti til frítíðarundirvísing veturin 2008-2009, og hvar heitt verður á kommununa vegna skúlan um at søkja Mentamálaráðið um at fáa játtaðan stuðul svarandi til hjáløgdu meting, sum í peningi er umleið kr. 290.000,00.

Hetta svarar til eitt undirvísingartímatal upp á 2.290 tímar. Veturin 2003-2004 brúkti skúlin umleið 1.300 tímar, meðan skúlin hevur nýtt 1.580 tímar veturin 2004-2005, veturin 2005-2006 1600 tímar, veturin 2006-2007 1.500 tímar og veturin 2007-2008 1.460 tímar.

Somuleiðis søkir skúlin um heimildir sjálvur at taka støðu til onnur tilboð, um so verður, at okkurt av tilboðunum fella burtur, t.d. av ov lítlari undirtøku. Eisini verður biðið um at fáa heimild at laga tímatalið til lærugreinarnar, um so verður, at fullur stuðul ikki verður veittur av Mentamálaráðnum.

Mælt verður eisini til, at luttøkugjaldið verður kr. 200,00, um skeiðið er styttri enn 40 tímar og kr. 400,00 um skeiðið er longri enn 40 tímar.

Eisini verður mælt til, at kommunan avsetir kr. 40.000,00 á konto 410020 til at nýta til ferðagjøld til lærarar, kunngerðir og møguliga útgerð. Vónin hjá leiðsluni fyri frítíðarundirvísingina er, at játtanin 410020 verður sama sum í 2008 kr. 40.000,00.

Kvøldskúlin hugsar sær at lýsa við nevndu tilboðum um miðjan september 2008.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini 27. august 2008, og mælir nevndin mælir býráðnum til at góðkenna uppskotið frá Fuglafjarðar kvøldskúla til frítíðarundirvísing veturin 2007-2008, og at býráðið søkir Mentamálaráðið um stuðul upp á kr. 290.000,00 svarandi til 2.290 undirvísingartímar. (Almenn frítíðarundirvísing 1.720 tímar + frítíðarvirksemi 570 tímar).

Kommunan rindar 50% av lønunum til lærarar í sambandi við vanliga frítíðarundirvísing, meðan Mentamálaráðið rindar hina helvtina. Ráðið rindar allar lønir til serstaka frítíðarundirvísing mett 210 undirvísingartímar.

Eisini verður mælt til, at skúlin fær heimild til at tillaga tímatalið til lærugreinarnar, um so verður, at fullur stuðul ikki verður veittur, og at skúlin somuleiðis fær heimild til sjálvur at taka støðu til onnur tilboð, um okkurt av tilboðunum av ymiskum orsøkum falla burtur.

Mælt verður býráðnum til, at luttøkugjaldið verður sum skotið verður upp kr. 200,00 fyri skeið styttri enn 40 tímar og kr. 400,00 fyri skeið longri enn 40 tímar galdandi frá 01. september 2008 at rokna.

Á fíggjarætlan kommununar fyri 2008 eru avsettar kr. 40.000,00 á konto 410020 "Kvøldskúlin aðrar útreiðslur", og nýttar eru kr. 6.634,46 pr. 31. august 2008 . Nevndin er sinnað til at heita á fíggjarnevndina um at aftur at avseta kr. 40.000,00 á fíggjarætlan kommununar fyri 2009.

Í sambandi við møguligan ferðapening til avstaðislærarar, sum koma at undirvísa í kvøldskúlanum er niðurstøðan hjá fyrisitingini, at eingin heimild er at gjalda hesum almenna ferðaendurgjald, sum er kr. 3,20 fyri hvønn koyrdan kilometur, tá ið talan ikki er um ferðing í arbeiðsørindum arbeiðsgevarans, men til og frá arbeiðið, sum kemur undir aðra skipan undir Taks.

Nevndin mælir somuleiðis býráðnum til at heita á leiðsluna fyri Fuglafjarðar kvøldskúla um at gera sítt til, at lýst verður aftur við telduskeiðiskeiði, sum ikki er við í uppskotinum frá Fuglafjarðar kvøldskúla.

Mentamálanevndin hevur móttikið skriv frá býráðsskrivaranum, dagfest 10. september 2008, har greitt verður frá ymiskum fíggjarligum viðurskiftum viðvíkjandi frítíðarundirvísingini veturin 2008-2009 í sambandi við skriv frá Mentamálaráðnum, dagfest 05. september 2008. Sambært uppskotinum frá Fuglafjarðar kvøldskúla verður mett, at kommununar partur, sum er 50% verður kr. 295.000,00 svarandi til 2080 tímar.

Í skrivinum frá Mentamálaráðnum verður boðað frá, at samlaða játtanin frá teirra síðu verður kr. 185.000,00 svarandi til 1.320 tímar, har játtaðar verða kr. 83.250,00 inniverandi fíggjarár, meðan kr. 101.750,00 verða játtaðar í 2009 fram til várið/summarið.

Henda játtan er kr. 105.000,00 minni enn fyriliggjandi uppskot frá mentamálanevndini leggur upp til, og tí kann verða staðfest, at antin má tímatalið og harvið einstakar lærugreinir verða stroknar ella má býráðið játta írestandi upphæddina. Um so verður, at hildið verður fast við uppskotið og harvið tilmælið, verður neyðugt at hækka samlaðu játtanina til kvøldskúlan við nevndu upphædd upp til kr. 395.000,00.

Um tímatalið skal verða lækkað samsvarandi játtanini frá Mentamálaráðnum, so verður talan um eina játtan upp á max. 1.320 tímar. Annars vórðu 1.460 tímar nýttir veturin 2007-2008. Sambært heimild í § 2, stk. 2 og § 17 og § 19 í LL nr. 70 frá 30. juni 1983 um frítíðarundirvísing við seinni broytingum hevur Mentamálaráðið gjørt av, at frá 01. august 2008 skulu kommunurnar fyrisita frítíðarundirvísingina á staðnum sambært galdandi lóggávu.

Mentamálanevndin hevur aftur havt málið til viðgerðar á fundi tann 11. september 2008, og heldur nevndin fast við tilmælið frá 27. august 2008 um at góðkenna fyriliggjandi uppskot og at søkja Mentamálaráðið um neyðugan studning upp á kr. 295.000,00, svarandi til 2080 tímar. Haraftrat kemur so sestøk fráitíðaundirvísing við 210 tímum, sum Mentamálaráðið rindar við 100%-um.

Grundgevingin fyri hesum er, at um so verður, at frítíðarundirvísingin kemur at verða á sama støði sum fyri veturin 2008-2009, so verður helst ikki neyðugt við eykajáttan í inniverandi fíggjarári, og kann ein meirjáttan verða veitt á komandi fíggjarætlan fyri 2009, treytað av góðkenning býráðsins.

**Avgerð:**
Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. (7-0).

**<u>Mál nr. 52/2008.</u>**

***Viðvíkjandi vali av arbeiðsbólki/hugskotsbóli at arbeiða við eldrabygging.***

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 04. september 2008 samtykt eftir tilmæli frá sosialu nevndini at seta ein arbeiðsbólk/hugskotsbólk at arbeiða við bygging av eldrasambýli, eldra- og røktarheimi, eldraíbúðum vm. í kommununi

Tá ið talan er um ein bólk ella nevnd, sum býráðið velur til at taka sær av ávísum uppgávum er talan um val av tílíkum sambært § 36, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og tí verður fyrisitingarliga mett neyðugt, at býráðið velur bólkin sambært tilmæli frá avvarðandi nevnd.

Á fundinum í sosialu nevndini tann 18. august 2008 varð nevndin samd um tilmæli til býráðið um arbeiðsbólkin, men av eini ella aðrari orsøk er tilmæli ikki latið býráðnum um teir persónar, sum nevndin mælir til skulu verða umboðaðir.

Tó varð nevndin samd um at hesir persónar verða valdir í bólkin frá 25. september til 31. desember 2008, t.v.s. inniverandi valskeið:

- Elisabeth D. Eldevig, limur í sosialu nevndin
- Eyðun á Lakjuni, formaður í sosialu nevndini
- Dánjal Vang, limur í sosialu nevdnini
- Leif Petersen, byggifrøðingur á teknisku deild
- Sunniva á Lakjuni, leiðari á Giljagarði
- Marianna Hansen, leiðari á Vesturstovu
- Irena Olsen, leiðari á sosialu deildini

Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni og skrivara.

**Avgerð:**
Tilmælið frá sosialu nevndini varð samtykt. (7-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.15.

Dánjal Vang Jann Toftegaard Eyðun á Lakjuni Elisabeth D. Eldevig

Súsanna Gaard Petur Abrahamsen Sigurð S. Simonsen

Jákup Frants Larsen